

# "Being John Malkovich" - ein løgin søga...

**Ein filmur við eini heldur løgnari søgu, sum fyri ein part gongur fyri seg inni í høvdinum á einum kendum sjónleikara...**

Komandi vika bjóðar sum vanligt eina rúgvu av ymiskum tilfari frá teimum ymisku sjónvarpsrásunum: Ferðafrásagnirnar við Michael Palin, ið leiða hann í fótsporini hjá Michael Hemingway og inn í Sahara oyðimørkina; fótbóltur úr Evropa og serliga Champipons League og á føroyska sjónvarpinum verða t.d. spurnakappingin Satsa á skránni og ein føroysk sending í tveimum pørtum, ið snýr seg um seyðahald.

Fleiri filmar verða vístir og nakrir meira sjálvsamir enn aðrir. T.d. verður ein eitt sindur sjálvsamur filmur á Dr1, "Kindergarten Cop". Tí, tað er ikki júst einoghvør, ið hevur høvuðsleiklutin. Guvernørinum av Kalifornia, Arnold Schwarzenegger - sum í løtuni stríðist við at fáa fíggjarstøðuna í statinum uppá rættkjøl aftur - hevur úr at gera í hesum filminum, her hann stríðist við at halda skil á børnum í einum barnagarði. Men ein annar filmur, sum er sjálvsamur í sær sjálvum, er filmurin týskvøldið á SvF, "Being John Malkovich".

"Malkovich..."
Tað er søgan, sum ger filmin serligan.
Dukkumakari Craig Zchwartz (John Cuzack) er keddur av, at eingin er áhugaður í leikdukkum hansara og tíðirnar eru ringar fyri dukkumakaran. Hann fær sær so eitt arbeiði afturat sum skjalavørður á eini skrivstovu, ið er á 7_. hædd! Men ein dagin uppdagar hann eina loyniliga hurð í einum arkivskápi á skrivstovuni. Og, tá hann fer inn, so endar hann í høvdinum á John Malkovich (John Malkovich). Hendan løtan inni í høvdinum á kenda sjónleikaranum varar 15 minuttir. Tá kona hansara (Cameron Diaz) eisini sleppir at royna hetta, gongur tað rættiliga galið fyri tilveruna hjá Craig og í sama viðfangi tekur søgan eitt heldur løgið sving.

Charlie Kaufman
Charlie Kaufman hevur skrivað hesa óvanligu filmssøguna. Eftir hendan filmin gjørdist hann verið ein av teimum mest eftirspurdu filmshøvundunum í Hollywood. Filmurin "Adaptation" var næsti stóri filmurin sum Kaufman arbeiddi við. Her leiktu stjørnurnar Nicholas Cage og Meryl Streep við, og sami leikstjórin frá "Being John Malkovich", Spike Jonze, stóð fyri upptøkunum. Søgan í hesum filminum er eins og í fyrrnevnda filminum heldur óvanlig. Nicholas Cage hevur leiklutin sum filmshøvundurin Charlie Kaufman og hugímyndaða tvíburð hansara Donald! Og afturat hesum, snýr filmurin seg, fyri ein stóran part, um tá, tann veruliga Charlie Kaufman skrivaði filmshandritið til sama filmin "Adaptation" - ja, rættiliga fløkt. Men hesin filmurin er, eins og "Being John Malkovich", væl eydnaður og hevur fingið sera góð ummælir.





Í SvF týskvøldið 25. november kl. 21.15







